# At veva



Tilfar :

- Pappírtallerk
- Stoppinál
- Tógvrestir
- Eina rammu
- Saks
- Klistriband

1. Klipp ólíkatal av hakkum í tallerkin. Tú kanst taka mát og tekna upp, men tú kanst eisini finna eina skipan í mynstrinum á tallerkinum, sí mynd.



2. Vint eitt lítið noða og klistra endan á bakið á tallerkinum.



3. Spenn tráðin passaliga fastan tvørtur um tallerkin. Enda í miðjuni, bint træðrirnar saman og veva við tí, sum er eftir av tráðnum, ella til tú metir, tað er passaligt. Aðru hvørja ferð skal nálin vera omanfyri tráðin og aðru hvørja ferð skal nálin fara undir tráðin.



4. Klipp ein nýggjan enda av tógvi, bint hann í tráðin, og halt á fram at veva millum træðrirnar. Vel litir og slag av tógvi, sum tær listir.



5. Fest endan, tá ið rundingurin er passaliga stórur.



6. Klipp endarnar aftanfyri á tallerkinum.





7.
Bint endarnar saman tveir og tveir.



8.
Klipp endarnar og legg teir inn í miðjuna.

